# Bygdarráðsfundur

# Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 18.07.2022 kl. 17.30

| | |
|---|---|
| Á fundi: | Ronni Hammer (fyri Janus Thomsen) |
| | Niels Olaf Eyvindsson |
| | Eir J. Norðberg |
| | Gunnhild Mortensen |
| | Poul Laust Christiansen (fyri Thorstein Thomsen) |
| | Martin í Nesi |
| Ikki møtt: | Janus Thomsen |
| | Thorstein Thomsen |
| Skrivari: | Johanna B. Djurhuus |

1. **102-74-2022: Val av garðaskoðara í Hvalba.**
   Claus Olsen hevur skrivliga boðað frá, at hann ynskir at verða loystur frá uppgávuni sum garðaskoðari í Hvalba.
   **Avgerð**:
   Samtykt varð einmælt, eftir uppskoti frá Ronni Hammer, at velja Hera Norðberg sum garðaskoðara ístaðin.

2. **102-75-2022: Umsókn um marknaumskipan – matr. nr. 180c og 183b, Hvalba.**
   Søkt verður um, at matr. nr. 180c letur umleið 104 m2 til matr. nr. 183b.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at viðmæla umsóknini um marknaumskipan.

3. **102-77-2022: Skúlanet – Hvalbiar skúli.**
   Sáttmáli um Landsnet/Skúlanet til Hvalbiar skúla millum KT Landsins og Hvalbiar Kommunu.
   **Trivnaðarnevndin 17.07.2022:**
   Nevndin útsetir málið fyri at kanna ymiskt hesum viðvíkjandi. Hava síðani fingið upplýst, at hetta nokk verður eitt krav at luttaka í.
   **Fíggjarnevndin 18.07.2022:**
   Einmælt samtykt at mæla til at taka av sáttmálanum um Skúlanet.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at taka av tilboðnum um Skúlanet.

4. **102-78-2022: Innkomin tilboð uppá skúlabarnaflutning innan kommunu.**
   Tá freistin var úti tann 15.07.2022, var eitt tilboð komið inn.

**Trivnaðarnevndin 17.07.2022:**
Nevndin mælir til at lata bygdarráðið taka støðu til málið á fundinum.
**Fíggjarnevndin 18.07.2022:**
Samtykt varð einmælt at mæla til **ikki** at taka av hesum tilboðnum.
**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini um ikki at taka av tilboðnum. Ronni Hammer kom við uppskoti um eina royndartíð hetta árið út, har foreldrini koyra børnini um morgunin og at tey verða koyrd heim úr skúla í taxa-bili seinnapartin. Samtykt varð einmælt at beina uppskotið í Trivnaðarnevndina.

5. **Ymiskt/kunning.**
Skriv frá Trivnaðarnevndini viðvíkjandi ymiskum tiltøkum, flakakapping, ruddingardøgum, jóla-haldi v.m.
**Trivnaðarnevndin 17.07.2022:**
Nevndin hevur ásett ymisk tiltøk í kommununi:
13.08.2022: Flakakapping
17.09.2022: Ruddingardagur við felags morgunmati í Roynhøllini og Ranhøll
27.11.2022: Jólatrøini tendra
06.04.2023: Páskareggjaveiða
**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

6. **Suðuroyarkalendarin 2023.**
Suðuroyarkalendarin fer til prentingar fyrsta dagin. Kommunan hevur keypt hesar frá Lions sein-astu mongu árini.
**Fíggjarnevndin 18.07.2022:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at keypa 250 stk. á kr. 100,00.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

7. **Ikki almenn mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 18.50

| | | |
|---|---|---|
| Ronni Hammer | Niels Olaf Eyvindsson | Eir J. Norðberg |
| Gunnhild Mortensen | Martin í Nesi | Poul Laust Christiansen |